# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Hans Frederik Husgaard, Tórshavn**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin kl. 17. Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 15 úr Vesturkirkjuni.

**Eyðbjørn Petersen, Fuglafjørður**, andaðist mánadagin, 68 ára gamal.

## Fimleikarar

Mynd frá realskúlaframsýningini sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her eru nakrir fimleikarar uttan fyri realskúlan umleið 1930.

Fimleikararnir eru f.v.: Leivur Jóanesarson, (ókendur), Eiler Mikkelsen, Jens Guttesen, Ingolf Dam Jacobsen, Terkelsen (lærari), Gunnar Waagstein, Ebbe Müller, Regin Dahl og Leivur Christiansen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, ella hevur okkurt at viðmerkja, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 253)



## Dagurin

1. oktober. Remigius, deyður í 533. Galliskur aðalsmaður, sum longu 22 ára gamal varð valdur til biskup í Reims. Hann kristnaði merovingarakongin Klovis í 496. Remigius doyði 96 ára gamal.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## MERKISDAGAR

**65 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 2. okt. fyllir Kitty Gudmundsen, í Vági, 65 ár. Føðingardagurin verður hildin í Billiardhúsinum frá kl. 19. Øll er hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 2. okt. fyllir Johan Thomasen, Tvøroyri, 80 ár. Dagurin verður hildin 3. okt., frá kl. 15 í heiminum hjá Elin og John Thomasen, Fornarett 13. í Trongisvági. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Sunnudagin 4 okt. fyllur Gudrun Joensen, Hósvík,80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini Harriet, á Fløtugøtu 12, Hósvík. Øll eru vælkomin.

**80 ár**
Mikudagin 7. oktober Johannes Berg bilasølumaður 80 ár. Føðingardagurin verður hildin á Hotel Føroyum hetta sama kvøldið. Byrjað verður kl.18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**85 ára føðingardagur**
Sunnudagin 4. okt. fyllir Bjarni Dal-Christiansen í Havn 85 ár. Føðingardagurin verður hildin heima leygardagin 3. okt. kl. 19. Øll eru vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Týsdagin 29. sept. fyllir Magnus Jacobsen úr Norðragøtu, búsitandi í Havn, 90 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 3. okt. saman við familjuni.

**90 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 2. okt. fyllir Johanna Johannesen, Jóhanna í Kinn, Fuglafjørður, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin við køkuborði í Lonini frá kl. 19.30. Øll eru vælkomin.

## Evi ung



Hevur tu hugsað um, at vit kunnu hava bæði glaðar og „illar“ rukkur? - Sært tú stúrin ella troytt/ur út uttan at vera tað? - Ella er vørrin blivin smøl við smáum rukkum rundanum? Flest øll vilja vit síggja frísk og glað út, sigur Evi Poulsen, sum hevur leigað seg inn á viðgerðarstovuna wellness. fo á Áarvegnum við sínum Restylane viðgerðum.

Evi er sjúkrarøktarfrøðingur og autoriseraður Restylane viðgerði. Síðani 2005 hevur hon arbeitt við hesum viðgerðum, og hevur hon tí fleiri ára royndir á økinum. Hon stovnaði sítt egna firma, EstETikA í august í ár.

Restylane hevur i meira enn 10 ár hjálpt milliónum av menniskjum at betra útsjóndina á ein nátturligan og tryggan hátt. Restylane er ein seria av andlitsviðger ðarproduktum sum eru mentar til at minka um óynsktar rukkur, skapar fyllu og ger húðuna yngri.

Restylane er eitt gelé, sum er baserað upp á hyaluronsyru, eitt evni sum longu er nátturliga í kroppinum. Geléið verður sproytað inn undir húðina, og úrslitið sæst sostatt beinavegin.

Umfatandi dokumentir eru, sum prógva at Restylane er trygt og effektivt, og sum eisini er orsøk til at estetiskir viðgerðarar um allan heim hava júst hetta evnið sum fyrsta val. Restylane er heimsins mest dokumenteraða húðfyllingarevni, og hevur leingivarandi fyrimunir uttan at vera permanent, soleiðis at tú ert frítt stillað/ur at viðlíkahalda virkningin.

Evi sigur, at í okkara døgum nýtist tær ikki at síggja eldri út, ent tu følir teg. Aldur er bert eitt tal. Við hjálp av Restylane kanst tú lata tína egnu fatan av vakurleika bestemma. Restylane er ein trygg og nátturlig viðgerð til húðynging, og kann í síni heild tilpassast tín tørv. Við at endurbyggja elastiskitetin og tónan í húðini fært tú eina friska og náttúrliga útsjónd.



*Áðrenn viðgerð*



*Eftir viðgerð*



*Restylane gelé*